tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest og Anfinn Leo, ið møtti fyri Kristinu Roest undir viðgerðini av máli nr. 7 á skránni.
Skrivari: Jónleyg J. Bech

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skattatølum 2018 | 3 |
| 2 | Eykajáttan heystið 2018 | 4 |
| 3 | Fíggjarætlan 2019 - Tvøroyrar Kommuna | 4 |
| 4 | Suðuroyar Ferðavinnufelag | 5 |
| 5 | Uppskot frá borgara um broyting av byggisamtykt fyri matr. 145a Trongisvágur | 6 |
| 6 | Endurskoðan av fundarskipanini hjá Tvøroyra Kommunu | 7 |
| 7 | Leigusáttmála fyri bygningin við Sílá | 7 |
| 8 | Tvøroyrar Skjalasavn | 9 |
| 9 | Stroyming av býráðsfundum | 9 |
| 10 | Heimild, at skriva undir skjøl vegna Tvøroyrar kommunu sambært § 44, stk. 2 í kommunustýrislógini | 10 |
| 11 | Roknskapur hjá Tvøroyrar Bókasavni 2017 | 11 |
| 12 | Standardavtala við Fjølrit | 11 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |


| | | |
|---|---|---|
| 13 | Uppskot til samstarvsavtalu um Sernám í Suðuroynni | 12 |
| 14 | Tilmæli í samband við umsókn um skonkiloyvi - Sp/f Glasstovan | 13 |
| 15 | Goymsluhøli til fýrverkarí hjá Nýggjársnevndini | 14 |
| 16 | Endurgjald frá Landsverki fyri asfalteringina í 2016 | 14 |
| 17 | Umboð í stýrisbólkin og í arbeiðsbólkin í sambandi við gerð av tilbúgvingarætlan fyri Hvalbiartunnilin | 15 |
| 18 | Uppskot um samstarv við Nám um undirvísingartilfar | 15 |
| 19 | Uppskot til broyting í starvsfólkaskipan fyri Tvøroyrar Kommunu | 16 |
| 20 | Tilmæli í samband við umsókn um skattafrælsi - Thorshavnfonden | 16 |
| 21 | Tilboð uppá niðurtøku av "losjuni" áTvøroyri | 17 |
| 22 | Umsókn um gerðabýti millum matr. nr. 28b og matr. nr. 23m / 23c | 18 |
| 23 | Eykaaðalfundur SEV 2018 | 19 |
| 24 | Kunning frá borgarstjóranum um feriu | 20 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Borgarstjórin lesur skránna til fundin upp og spyr, um viðmerkingar eru til skránna. Kristina Roest viðmerkir, at hon saknar eitt mál, ið meirilutin hevur biðið um at fáa á skrá meira enn einaferð, málið um dupultmandatið. Biðið var 5. septembur um at fáa tað á skrá til fyrstkomandi býráðsfund. Kristin Michelsen spyr, hvat so er ætlanin, um tey ynskja málið á skrá í dag ella til næsta fund. Kristina Roest svarar ongantíð ov skjótt, tí tað skuldi havt verið á skrá. Kristin Michelsen kunnar um, at hann hevur kært Heilsu- og Innlendismálaráðið fyri ógegni 03.12.2018 í samband við teldupost frá Jónas Tór Næs, HIMR dagf. 02.12.2018. Kristina Roest spyr, um hann kann útgreina tað. Kristin Michelsen greiðir frá, at Heilsu- og Innlendismálaráðið úttalaði seg um málið í august í 2017 og er tískil ógegnigt. Hetta vísti advokaturin Eyðbjørn Larsen á í skrivi dagf. 01.10.2018. Hetta hevur Heilsu- og Innlendismálaráðið ikki tikið til viðgerðar, og onki var nevnt um hetta í skrivi frá ráðnum dagf. 09.10.2018. Tí hevur hann biðið um at fáa flutt málið í annað aðalráð. Kristina Roest sigur, at tey ynsktu bara at fáa málið á skrá her og at viðgera tað. Hon spyr, um hvør orsøkin er til ikki at seta tað á skrá. Kristin Michelsen sigur, at tað er tí at støða ikki er tikin til ógegnið hjá Heilsu- og Innlendismálaráðnum. Kristina sigur, at tey vilja hava viðmerkt í gerðabókina, at tey eru ónøgd við, at málið ikki er komið á skrá. Biðið var ikki um at fáa málið á skrá.

Kristina Roest viðmerkir, at hon tekur ikki undir við seinasta setninginum í brotinum omanfyri, har skrivað er, at biðið var ikki um at fáa málið á skrá. Súsanna Bertholdsen, Bogi Johannesen og Bjarni Hammer taka undir við viðmerkingini hjá Kristinu Roest.

Anita Vibergsdóttir viðmerkir, at hon undrast stórliga á, at eftir at borgarstjórin spurdi, um nakar hevði nakað meira at viðmerkja í málinum, var ongin viðmerking frá meirilutanum.

Súsanna Bertholdsen ynskir eisini at fáa viðmerkt, at tað ikki er í lagi, at ongin regluligur býráðsfundur hevur verið síðan septembur. Kristin Michelsen sigur, at fundurin, ið skuldi vera 6. novembur, varð framskundaður til 29. oktobur og sostatt hevur fundur verið. Súsanna Bertholdsen svarar, at talan ikki var um regluligan fund.

**25.20.00-I00-1-18**

## 1. Samanbering av skattatølum 2018

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar fyri novembur og fyri árið sum heild.

### Skjøl

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri



- Skattur 2018.xlsx
- Skattur november 2018.xlsx

**00.30.18-Ø00-3-18**

## 2. Eykajáttan heystið 2018

### Avgerð

1. viðgerð av eykajáttan á heysti 2018 áljóðandi 3.720.200 kr., ið verður fíggjað av likviditetinum:

Eykajáttan einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

### Skjøl

- Eykajáttan 2018.pdf

**00.30.00-S00-1-18**

## 3. Fíggjarætlan 2019 - Tvøroyrar Kommuna

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 29. november 2018, pkt. 3:**
Málið verður beint fyri býráðið.

### Avgerð

2. viðgerð av fíggjarætlan fyri 2019:

Skattaprosentið verður ásett til 20,90% og barnafrádrátturin verður 7.000 kr í 2019.

Borgarstjórin kunnar um uppskotið til fíggjarætlan fyri 2019 frá minnilutanum Kristin Michelsen, Anitu Vibergsdóttir og Alva Mortensen.
Bjarni Hammer kunnar um uppskotið til fíggjarætlan fyri 2019 frá meirilutanum Bjarna Hammer, Boga Johannesen, Súsonnu Bertholdsen og Kristinu Roest.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Anita Vibergsdóttir ynskir viðmerkt, at hon heldur tað vera eitt gott hugskot, at kommunan fer at selja grundstykkir fyri ein bíligan pening fyri at fáa fólka at flyta til, evt. við einum klausuli um, at byggjast skal innan eitt ávíst áramál.

Atkvøðugreiðsla um skattaprosent, barnafrádrátt og raksturin, ið øll eru samd um: Skattaprosent á 20,90% barnafrádráttur á 7.000 kr. og rakstur smb. uppskotunum einmælt samtykt.

Atkvøðugreiðsla um uppskot til íløgur frá Kristin Michelsen, Anitu Vibergsdóttir og Alva Mortensen á ljóðandi 26,6 mió: Tríggjar atkvøður fyri, fýra atkvøður ímóti. Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsonna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu ímóti. Uppskotið fallið.

Atkvøðugreiðsla um uppskot til íløgur frá Bjarna Hammer, Boga Johannesen, Súsonnu Bertholdsen og Kristinu Roest á ljóðandi 31,35 mió: Fýra atkvøður fyri, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsonna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu fyri. Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ikki, Uppskotið samtykt.

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon undrast á, at m´la um bílig grundstykkir verður tikið upp á fundinum uttan at vera á skrá til fundin.

### Skjøl

- Útrokning skattaálíkning (Bjarni, Súsanna, Bogi og Kristina).pdf
- Uppskot FÆ2019 (Kristin, Anita og Alvi).pdf
- Útrokning skattaálíkning (Kristin, Anita og Alvi).pdf
- Yvirlit løgur (Kristin, Anita og Alvi).pdf
- Yvirlit íløgur 2019 (Bjarni, Súsanna, Bogi og Kristina).pdf
- Uppskot FÆ2019 (Bjarni Súsanna Bogi og Kristina).pdf

**00.17.15-A00-1-18**

## 4. Suðuroyar Ferðavinnufelag

### Samandráttur

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri



12. juli 2017 gjørdi Fíggjarnevndin fýra tilmælir til býráðið í samband við nýggja ferðavinnupolitikkin. Eitt av hesum tilmælum var, at Tvøroyrar Kommuna tók seg úr samstarvinum um Suðuroyar Ferðavinnufelag frá 1. januar 2018. men Tvøroyrar Býráð tók á fundi sama dag einans støðu til eitt av tilmælunum frá fíggjarnevndini, tað ið snúði seg um fígging av arbeiðnum við nýggja ferðavinnupolitikkinum. Sostatt hevur býráðið enn ikki tikið eina avgerð um samstarvið um Suðuroyar Ferðavinnufelag.

### Avgerð

Einmælt samtykt, at Tvøroyrar Kommuna tekur seg úr samstarvinum um Suðuroyar Ferðavinnufelag pr. 1 januar 2019.

### Skjøl

- Dagsordenspunkt: Innlendis- og økismenning av ferðavinnuni og verkætlan í Suðuroynni í hesum sambandi behandlet på mødet 12. juli 2017 kl. 16:00 (Býráðsskrivstovan) i Býráðið (2017).docx

**01.02.00-G01-1-18**

## 5. Uppskot frá borgara um broyting av byggisamtykt fyri matr. 145a Trongisvágur

### Málsfrágreiðing

Sí umbøn, dagf. 17-10-2018.

**Tekniska nevnd, 31. oktober 2018, pkt. 2:**
Nevndin mælir til, at broyta byggisamtykt fyri matr. nr. 145a, luturin í Beitinum og Fornarrætt, 1762 m2, soleiðis at økið verður flutt frá fríøki til bústaðarøki, soleiðis at tað ber til at selja burturav til sethúsaeigararnar í Fornarætt.

### Avgerð

Einmælt samtykt at broyta byggisamtykt fyri matr. nr. 145a, luturin í Beitinum og Fornarrætt, 1762 m2, soleiðis at økið verður flutt frá fríøki til bústaðarøki.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 16-2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Skjøl**

- Ny matrikel.pdf
- VS: Ændring af matrikel 145a Trongisvágur

**00.15.00-A21-1-09**

## 6. Endurskoðan av fundarskipanini hjá Tvøroyra Kommunu

### Avgerð

Súsanna Bertholdsen skýtur upp, at býráðið hevur ein arbeiðsdag um fundarskipanina, ið ikki er endurskoðað síðan 2009.

Atkvøðugreiðsla um uppskotið frá Súsonnu Bertholdsen: 6 atkvøður fyri, ongin ímóti. Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Bogi Johannesen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Kristin Michelsen atkvøddi ikki Uppskotið samtykt.

**Skjøl**

- Samtykt fundarskipan

**82.01.00-Ø00-1-18**

## 7. Leigusáttmála fyri bygningin við Sílá

### Málsfrágreiðing

**Tekniska nevnd, 5. november 2018, pkt. 3:**
Formaðurin kunnaði um, at kommunustjórin arbeiðir við málinum í løtuni.

**Tekniska nevnd, 26. november 2018, pkt. 7:**
Nevndin er kunnað um broytingarnar í leigusáttmálanum, og leigusáttmálin verður lagt fyri fíggjarnevndina.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 16-2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Fíggjarnevndin, 29. november 2018, pkt. 8:**
Kristina Roest fer av fundinum vegna ógegni áðrenn viðgerðin av hesum málinum byrjar.

Borgarstjórin tekur ikki undir við, at leigusáttmáli verður gjørdur, fyrrenn svar er komið uppá fyrispurning sendur til HIMR 12.10.2018 viðv. heimild at gera leigusáttmálan. Hann ynskir viðmerkt, at tað undrar hann, at leigusáttmálin ikki hevur verið til viðgerðar í sosialu nevnd. Hann vísir á, at smb. leiðsluni í Bú- og Heimatænastuni, so er ongin bíðilisti á økinum.

Bjarni Hammer mælir til, at leigusáttmáli verður gjørdur við eigararnar av bygninginum við Sílánna, vísandi til at starvsfólk hava úttalað, at tænastan ikki er tann sama á Tvøroyri sum aðrarstaðni í oynni, og vísandi til, at borgarir verða fluttir úr býnum. Hann er eisini av tí áskoðan, at Tvøroyri eigur at hava hølir til eldraøkið.

Málið verður beint fyri býráðið.

## Avgerð

Kristina Roest fer av fundinum vegna ógegni. Hon ynskir, at Anfinn Leo tekur sætið fyri seg. Borgarstjórin viðmerkir, at hann metir tað vera undrunarvert, at varalimur kemur inn, uttan at umsitingin er kunnað um tað. Anfinn Leo tekur sætið fyri Kristinu Roest í hesum málinum.

Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen mæla til at bíðað verður við málinum til svar er komið frá Heilsu- og Innlendismálaráðnum.

Anita Vibergsdóttir ynskir viðmerkt, at hon ikki er ímóti at fáa eitt sambýli á Tvøroyri, men hon er ímóti at Tvøroyrar Kommuna ger ein leigusáttmála, tí økið liggur undir Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy.

Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Anfinn Leo halda fast við tilmælið frá Bjarna Hammer í fíggjarnevndini.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Kristin Michelsen, Anitu Vibergsdóttir og Alva Mortensen: tríggjar atkvøður fyri, tríggjar atkvøður ímóti. Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen atkvøddu ímóti, Anfinn Leo atkvøddi ikki. Tilmælið fallið.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Bjarna Hammer í fígjjarnevndini: Fýra atkvøður fyri, ongin atkvøða ímóti. Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Anfinn Leo atkvøddu



Formansváttan

fyri. Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ikki. Tilmælið samtykt við fýra atkvøðum fyri og ongari ímóti.

**19.02.00-A00-1-17**

## 8. Tvøroyrar Skjalasavn

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 1. oktober 2018, pkt. 8:**
Einmælt samtykt at mæla til, at kommunan undirskrivar deponeringsavtalu við Tjóðskjalasavnið.

### Avgerð

Einmælt samtykt at Tvøroyar Kommuna undirskrivar deponeringsavtalu við Tjóðskjalasavnið um savnindi hoyrandi til A/S J. Mortensens Eftf.

### Skjøl

- Frásøgn frá fundi við Kára Jespersen og Jens Paula Nolsøe hin 19.09.2018
- Uppskot til deponeringsavtalu
- Samrøða við Kára Jespersen hin 26.09.2018

**00.01.00-A00-17-16**

## 9. Stroyming av býráðsfundum

### Samandráttur

Forkvinnan ynskir málið um stroyming av býráðsfundum á skrá.

### Málsfrágreiðing

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Mentanarnevndin, 1. oktober 2018, pkt. 14:**
Málið verður beint fyri býráðið til umrøðu og støðutakan.

Samstundis verður heitt á umsitingina at kanna, hvør útgerð er egnað til endamálið.

### Avgerð

Atkvøðugreiðsla um stroyming av býráðsfundum: 6 atkvøður fyri, ein atkvøða ímóti. Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu fyri, Kristin Michelsen atkvøddi ímóti. Málið fallið.

### Skjøl

- Teldupostur frá Jóhan Lamhauge, Kf

**00.01.10-A00-5-17**

## 10. Heimild, at skriva undir skjøl vegna Tvøroyrar kommunu sambært § 44, stk. 2 í kommunustýrislógini

### Samandráttur

Hin 1. august 2018 tók Jónleyg J. Bech við aftur starvinum sum kommunustjóri. Tískil verður mælt til at heimila henni aftur at undirskriva skjøl um keyp og sølu av fastari ogn, leigusáttmálar, lániskjøl o.t. kommununar vegna saman við borgarstjóranum, og samstundis taka somu heimild frá Henrik W. Joensen, ið røkti starvið sum kommunustjóri eitt tíðarskeið.

### Avgerð

Einmælt samtykt at heimila Jónleyg J. Bech at undirskriva skjøl um keyp og sølu av fastari ogn, leigusáttmálar, lániskjøl o.t. kommununar vegna saman við borgarstjóranum, og samstundis taka somu heimild frá Henrik W. Joensen.

**21.00.00-S55-1-18**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## 11. Roknskapur hjá Tvøroyrar Bókasavni 2017

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 6. september 2018, pkt. 3:**
Málið verður beint í mentanarnevndina.

**Mentanarnevndin, 1. oktober 2018, pkt. 4:**
Umsitingin kannar, hvat er bókað undir telefon og internet hjá bókasavninum.

Nevndin mælir býráðnum til at samtykkja roknskapin hjá Tvøroyrar Bókasavni fyri 2017.

**Fíggjarnevndin, 1. november 2018, pkt. 2:**
Nevndin mælir einmælt til at býráðið samtykkir roknskapin hjá Tvøroyrar Bókasavni fyri 2017.

### Avgerð

Roknskapurin hjá Tvøroyrar Bókasavni fyri 2017 einmælt samtyktur.

### Skjøl

- Roknskapur 2017

**00.01.00-6-18**

## 12. Standardavtala við Fjølrit

### Samandráttur

Fjølrit ynskir at gera avtalur við kommunurnar og hevur sent uppskot til standardavtalu til støðutakan.

### Málsfrágreiðing

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Mentanarnevndin, 1. oktober 2018, pkt. 6:**
Einmælt samtykt at mæla til, at Tvøroyrar Kommuna undirskrivar avtalu við Fjølrit.

**Fíggjarnevndin, 1. november 2018, pkt. 3:**
Umsitingin kannar, hvørjar avtalur aðrar kommunur hava gjørt. Tosað verður eisini við skúlaleiðsluna um tørvin.

### Avgerð

Einmælt samtykt at undirskriva avtalu við fjølrit um nýtslu av vardum verkum til undirvísingarvirksemi og innanhýsis nýtslu.

### Skjøl

- Svarskriv KF um standardavtaluna (003).docx
- Fjølrit og KF fyribils standaravtala (1).docx
- Teldupostur frá Sunda kommunu
- Teldupostur frá Runavíkar Kommunu
- Fyrispurningur viðv. avtalu við Fjølrit frá Vestmanna Kommunu
- Teldupostur frá Vágs Kommunu
- Teldupostur frá Vestmanna Kommunu
- Teldupostur frá Fuglafjarðar Kommunu
- Teldupostur frá Finn Thomsen, skúlastjóra

**27.00.00-I00-2-18**

## 13. Uppskot til samstarvsavtalu um Sernám í Suðuroynni

### Málsfrágreiðing

**Sosiala nevnd, 2. oktober 2018, pkt. 3:**
Nevndin mælir til at broyta innihaldið í innganginum til soljóðandi:

Kommunurnar í Suðuroynni hava gjørt av at samstarva um skrivstovuhaldið hjá SERNÁMS-deildini í Suðuroynni, sum verður staðsett í Vági. Hendan avtalan staðfestir hetta samstarv.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri



| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Einmælt samtykt at mæla býráðnum til at undirskriva avtaluna um skrivstovuhaldið hjá Sernámsdeildini í Suðuroy við omanfyri nevndu broyting.

**Fíggjarnevndin, 1. november 2018, pkt. 4:**
Umsitingin setur seg í samband við Sernám fyri at fáa nærri lýst, hvørjar arbeiðsuppgávur liggja hjá einum møguligum skrivara.

### Avgerð

Bíðað verður eftir svari uppá fyrispurning sendur Sernám.

### Skjøl

- Uppskot til samstarvsavtalu sent býráðslimunum
- 2018-08 Samstarvsavtala um Sernám í Suðuroy.docx

**22.01.01-G00-1-18**

## 14. Tilmæli í samband við umsókn um skonkiloyvi - Sp/f Glasstovan

### Samandráttur

Sp/f Glasstovan søkir um skonkiloyvi, sí viðhefta skjal.

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 1. november 2018, pkt. 17:**
Einmælt samtykt at mæla til at Sp/f Glasstovan fær loyvi til útskonking av rúsdrekka.

### Avgerð

Einmælt samtykt at viðmæla, at Sp/f Glasstovan fær skonkiloyvi.

### Skjøl

- Umsókn um skonkiloyvi

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 16-2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**14.00.00-G01-2-18**

## 15. Goymsluhøli til fýrverkarí hjá Nýggjársnevndini

### Samandráttur

Sí viðheftu skjøl.

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 29. oktober 2018, pkt. 3:**
Einmælt samtykt at mæla til at taka av tilboðnum uppá eina 40" bingju til Nýggjársnevndina og seta hana út í grótbrotið. Mælt verður til at fíggja keypið av játtanunum til stuðul. Eru inntøkurnar hjá kommununi hægri enn roknað við í fíggjarætlanini, verður keypið fíggjað av tí.

**Fíggjarnevndin, 1. november 2018, pkt. 18:**
Málið verður beint fyri býráðið til støðutakan.

### Avgerð

Einmælt samtykt at taka av tilboðnum uppá eina 40" bingju til Nýggjársnevndina. Bingjan verður stillað út í grótbrotið.

### Skjøl

- fyrverk bingjur 16-10-2018rjg.doc
- Fýrverk og el-nýtslu á bedingini.docx

**05.01.08-Ø61-1-18**

## 16. Endurgjald frá Landsverki fyri asfalteringina í 2016

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 1. november 2018, pkt. 19:**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Einmælt samtykt at taka av uppskotinum um avtalu um endurgjald í samband við reklamatiónsarbeiði frá Landsverk, dagf. 10.10.2018.

### Avgerð

Einmælt samtykt at aka undir við avtaluni um endurgjald í samband við reklamatiónsarbeiði frá Landsverk, dagf. 10.10.2018.

### Skjøl

- Skriv frá Landsverk

**05.03.05-G01-1-17**

## 17. Umboð í stýrisbólkin og í arbeiðsbólkin í sambandi við gerð av tilbúgvingarætlan fyri Hvalbiartunnilin

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 1. november 2018, pkt. 20:**
Borgarstjórin kunnar um skrivið frá Jákup N. Olsen dagf. 12.10.2018.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um skrivið frá Jákup N. Olsen dagf. 12.10.2018.

### Skjøl

- Tilbúgvingarætlan fyri Hvalbiartunnilin

17.02.09-A00-1-18

## 18. Uppskot um samstarv við Nám um undirvísingartilfar

### Avgerð

Málið verður beint í mentanarnevndina.

### Skjøl

- Upprit um samstarv
- Teldupostur frá Finn Thomsen, skúlastjóra

**00.15.00-A21-1-09**

## 19. Uppskot til broyting í starvsfólkaskipan fyri Tvøroyrar Kommunu

### Samandráttur

Í uppskotinum til broytingar í starvsfólkaskipanini fyri Tvøroyrar Kommunu eru pkt. 5 viðv. sjúkrafráveru, pkt. 6 viðv. aðrari fráveru og pkt. 16 viðv. sosialum miðlum løgd afturat galdandi starvsfólkaskipan.

### Avgerð

1. viðger av broyting í starvsfólkaskipanini:

Broytingar einmælt samtyktar við 1. viðgerð.

### Skjøl

- Uppskot til broyting í starvsfólkaskipan
- dagførd og góðkend starvsfólkaskipan 10.09.2018

**25.00.00-Ø47-1-18**

## 20. Tilmæli í samband við umsókn um skattafrælsi - Thorshavnfonden

### Málsfrágreiðing

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Fíggjarnevndin, 29. november 2018, pkt. 1:**
Einmælt samtykt at mæla til at ganga umsóknini frá Thorshavnfonden um skattafrælsi á møti.

### Avgerð

Einmælt samtykt at viðmæla, at umsóknin um skattafrælsi frá Thorshavnfonden verður gingin á møti.

### Skjøl

- Skriv frá TAKS

**20.00.00-I00-16-17**

## 21. Tilboð uppá niðurtøku av "losjuni" áTvøroyri

### Málsfrágreiðing

**Tekniska nevnd, 31. oktober 2018, pkt. 4:**
Nevndin er kunnað um tilboð frá BKE um niðurtøku av "losjuni", áljóðandi 177.000,00 uttan mvg. Nevndin mælir til, at taka av tilboðnum og at tað verður fíggjað innanfyri fríggjarkarmin hjá Teknisku Deild.
Eisini verður mælt til at fáa avgreitt yvirtøkuna, har útreiðslan til niðurtøku verður keypsgjald. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin, 29. november 2018, pkt. 4:**
Borgarstjórin viðmerkir, at hann undrast á, at tað bert er biðið um eitt tilboð í málinum og arbeiðið ikki er bjóðað út. Hann mælir til at bíða við støðutakan í málinum til avgjørt er, hvar nýggjur skúli skal byggjast.

Bjarni Hammer og Kristina Roest taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd um at taka av tilboðnum frá BKE og at tað verður fíggjað innanfyri fríggjarkarmin hjá Teknisku Deild, umframt at fáa avgreitt yvirtøkuna, har útreiðslan til niðurtøku verður keypsgjald.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Avgerð

Borgarstjórin ynskir viðmerkt, at hann kærir málið til Kommunala Eftirlitið, um arbeiðið ikki verður bjóðað út. Hann viðmerkir, at ognarviðurskiftini ikki eru uppá pláss og at arbeiðið ikki er bjóðað út.

Borgarstjórin mælir til at fáa ognarviðurskiftini uppá pláss, at bíða við støðutakan í málinum til avgjørt er, hvar nýggjur skúli skal byggjast og at arbeiðið verður bjóðað út til meira enn ein arbeiðstakara. Atkvøðugreiðsla um tilmælið: Tríggjar atkvøður fyri, fýra ímóti. Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu ímóti, tilmælið fallið.

Kristina Roest ynskir viðmerkt, at hon heldur tað vera órættvíst at bjóða arbeiðið út aftaná, at bæði upphædd og navn á innkomna tilboðnum er almannakunngjørt á almennum býráðsfundi.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá teknisku nevnd um at taka av tilboðnum frá BKE og at tað verður fíggjað innanfyri fríggjarkarmin hjá Teknisku Deild, umframt at fáa avgreitt yvirtøkuna, har útreiðslan til niðurtøku verður keypsgjald. Fýra atkvøður fyri, ein atkvøða ímóti. Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu fyri, Kristin Michelsen atkvøddi ímóti, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ikki. Tilmælið samtykt.

## Skjøl

- Tilboð losjan Tvøroyri.pdf
- VS: Losjan

**13.06.02-P20-1-17**

## 22. Umsókn um gerðabýti millum matr. nr. 28b og matr. nr. 23m / 23c

### Málsfrágreiðing

**Tekniska nevnd, 2. oktober 2017, pkt. 7:**
Alvi Mortensen fór av fundinum undir viðgerðini av hesum máli.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 16-2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Nevndin mælir ikki til at fremja gerðabýtið í verandi uppskoti, men vil heita á [umsøkjaran] um at koma við frágreiðing um hvussu nógv lendi tørvur er á til víðkan av virkinum. [Umsøkjarin] verður biðin um at koma á fund, innan uml. 14 dagar.

**Tekniska nevnd, 5. november 2018, pkt. 5:**
Alvi Mortensen fór av fundinum og luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

Bjarni Hammer og Súsanna Bertholdsen mæla til at fremja gerðabýtið, tó skal ikki latast lendi frá matr. nr. 23c, men 23m verður latið fyri 28b, og kommunan átekur seg úttreiðsluna av gerðabýtinum.

**Fíggjarnevndin, 29. november 2018, pkt. 6:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku nevnd um at fremja gerðabýtið, tó skal ikki latast lendi frá matr. nr. 23c, men 23m verður latið fyri 28b, og kommunan átekur seg úttreiðsluna av gerðabýtinum. Tekniska deild setur seg í samband við umsøkjaran at vita, um hetta hevur áhuga hjá honum.

### Avgerð

Alvi Mortensen fer av fundinum vegna ógegni undir viðgerðini av hesum málinum.

Einmælt samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd.

### Skjøl

- Skriv
- Kortskjøl

**00.17.00-I02-1-18**

## 23. Eykaaðalfundur SEV 2018

### Avgerð

Súsanna Bertholdsen kunnar um eykaaðalfundin hjá SEV 30.11.2018.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.01.00-A00-7-18**

## 24. Kunning frá borgarstjóranum um feriu

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um, at hann frá ónsdegnum 5. desembur.

Kristina Roest viðmerkt, at hon setur spurnartekin við, hvussu langa feriu borgarstjórin eigur, vísandi til, at hann eisini var í feriu í maj.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 16-2018 |
| Fundardagur | 3. december 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin**

**Fundur lokin**

Kristin Michelsen: ____________

Bjarni Hammer: ____________

Anita Vibergsdóttir: ____________

Bogi Johannesen: ____________

Alvi Mortensen: ____________

Kristina Roest: ____________

Súsanna Bertholdsen: ____________

Anfinn Leo: ____________



Formansváttan